# Syndarlig vanlukka kravdi mannalív

**Týsdagurin gjørdist ein feigdardagur fyri Leynar. Ein maður í bygdini læt lív við eina arbeiðsvanlukku í Vestmanna. Ein miseydnað spreinging varð atvoldin til deyðsfallið, og nú verður kannað, um nakar kann ábyrgdast, ella um talan var um hendiligt óhapp**

DEYÐSVANLUKKA
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Leynar syrgja. Ein arbeiðsvanlukka seinnapartin týsdagin kravdi lívið hjá einum av raskastu monnunum í bygdini í sambandi við spreingiarbeiði í Vestmanna.

Maðurin, ið læt lív, var Jákup Hermansen úr Leynum, ella Jákup á Fossinum, sum hann verður nevndur. Eitt fantastiskt menniskja, siga tey, sum kenna hann.

– Hann var raskur, hjálpsamur og ein góður lærumeistari, sum dugdi ómetaliga væl at halda óvitunum til. Ein svárur missur fyri mong, og ikki minst fyri bygdina. Onkuntíð kennist tað serliga órættvíst, at summi vera skrykt burtur, sigur ein maður, sum plagdi at bóndast og veiða saman við Jákupi á Fossinum í Leynum.

Jákup á Fossinum varð 57 ára gamal, var stakur og hevði eingi børn.

## Doyði á staðnum

Arbeiðsvanlukkan hendi týsdagin klokkan 13.45 í sambandi við spreingiarbeiði á Válinum í Vestmanna. Kvívíkar kommuna arbeiðir við at gera reinsiverk, og teir seta brunnar upp. Húsini á Válinum standa dygst við sjóvarmálan, og tað er neyðugt at spreingja helluna fyri at geva pláss til brunnarnar. Fyrrapartin týsdagin skuldu teir spreingja, men tað miseydnaðist. Tað futtaði bara úr holunum, og einki sprongdist.

Spreingimeistarin gekk út frá, at allar perlurnar vóru brostnar, og tí fær Jákup á Fossinum boðini at bora upp úr nýggjum, greiðir Ivan Klein Olsen, sýslumaður í Vestmanna, frá. Tað merkir, at nýggj hol skulu borast nakrar sentimetrar frá gamla holinum, umleið hálvan annan metur niður í jørðina.

– Tá hann kemur niður á botn, halda teir, at hann er komin inn í hitt gamla holið, har ein óbrostin perla liggur. Tað brestur, og borurin sleingist uppeftir í høvdið á manninum, sum doyr á staðnum, sigur sýslumaðurin.

Jákup var einsamallur beint har, sum vanlukkan hendi, men lagnan vildi tað soleiðis, at bróðirin stóð einar 30 metrar frá og arbeiddi við einum rennigravara, tá vanlukkan hendi.

## Kanna tilburðin

Tá ein slík arbeiðsvanlukka kemur fyri, skal Arbeiðseftirlitið upp í leikin.

Tíbetur eru vit ikki von við slíkar vanlukkur í Føroyum, men tað merkir eisini, at vit ongar serfrøðingar hava á økinum. Tað hava tey heldur ikki í Danmark, men tað ljóðar, at serkøn hjálp skal fáast í Noregi til kanningararbeiðið.

Enn er ov tíðliga at siga, um tað kundi verið sloppið undan vanlukkuni. Tað fara kanningarnar at vísa.

– Eitt er givið. Onkur skal ábyrgdast, tá slíkt hendir, sigur Ivan Klein Olsen, sýslumaður.

Av arbeiðseftirlitinum verður hinvegin sagt, at teirra uppgáva er ikki at draga nakran til svars. Tað liggur til løgregluna at gera av. Hjá arbeiðseftirlitinum ræður um at fyribyrgja, at slíkt ikki hendir aftur. Nær kanningarnar eru lidnar, fær Arbeiðseftirlitið ikki sagt.




*Ein syrgilig vanlukka, sum kravdi eitt mannalív, hendi á Válinum í Vestmanna týsdagin. Løgreglan hevur avbyrgt økið fremst í myndini, meðan kannað verður, hvat hendi.*

*Mynd: Jens K. Vang*

## Tøkk

Vit takka hjartaliga øllum, sum á ymsan hátt sýndu samkenslu tá maður, pápi, verðfaðir, abbi og langabbi okkara

**Sámal Jóhannes Svend Poulsen**
**Á Válinum**

doyði og varð jarðaður.

Takk til heimarøktarar í Vestmanna, sum gingu til hansara dagliga.
Serstakliga takka vit Ellis- & Røktarheiminum í Klaksvík, sum hevði møguleika at hava hann til umlættingar hesa seinastu tíðina. Eisini ein serstøk tøkk til starvsfólkið á Klaksvíkar Sjúkrahúsi fyri teirra hjálp og beinasemi.
Tøkk til prestar, til berarar, sangarar, gravarar og øll tykkum, ið fylgdu Jóhannesi til hansara seinasta hvíldarstað.
Eisini tøkk til tykkum øll, sum á annan hátt hjálptu við jarðarferðini.

*Fyri tey avvarandi*
**Tordis Poulsen**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum sýndu samkenslu, tá okkara elskaði pápi, verpápi og abbi

**Anton H. Henriksen**
**Sørvágur**

andaðist og varð borin til hvíldar.

Takk til sangarar, berarar og gravarar.
Túsund takk til tykkum øll, sum á ymsan hátt hjálptu til og takk til Ingu Poulsen Dam, prest, fyri tey vøkru og troystarríku orð.

Tøkk til tykkum, sum hjálptu til við ervinum, tykkum, sum sendu blómur og kransar, og tykkum, sum sendu eina peningagávu til Sclerosefelagið. Tøkk til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Eyðgunn og Gitta vil familju**




